# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 21. mars 2023 |
| Mál nr.: | 23/04306-9 |
| Málsviðgjørt: | BB |
| Ummælistíð: | 08.-13. mars 2023 |
| Eftirkannað: | 09. mars 2023 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum**
(Heimild at býta upp embætisuppgávur millum próstar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 60 frá 7. juni 2007 um fólkakirkjuna í Føroyum verður aftan á § 5 sett:

"**§ 5 a.** Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar gera av, at tveir próstar skulu vera í sama próstadømi. Landsstýrismaðurin lutar tá, eftir tilmæli biskups, embætisskyldurnar próstanna millum og ger av, hvør teirra er limur í Próstadømisráðnum."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í kirkjuni hevur í eina tíð verið rætt um uppskot til nýggj átøk og ábøtur, teirra millum ábøtur at lætta um fyrisitingarligu tilgongdirnar. Biskupur hevur í framhaldi av hesum heitt á landsstýrismannin um at broyta lógina, soleiðis at til ber at býta embætisuppgávurnar upp innihaldsliga millum próstar, tí at ov stór arbeiðsbyrða nú liggur á dómprósti, ið er einasti próstur, sum er.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Skotið verður upp at laga til løgligu karmarnar um galdandi skipan við prósti, próstadømi og próstadømisráði.

Próstur er sóknarprestur, ið røkir próstaembæti umframt. Hann er – lutvíst í egnum embæti, lutvíst vegna biskup, og lutvíst sum limur í próstadømisráðnum – fyrisitingarligt millumlið millum prestar, kirkjuráð og biskup í mongum málum.

Próstadømisráðið, har próstur er føddur limur og kirkjuráðini í landinum velja hinar 4, hevur umsjón við fíggjarviðurskiftunum hjá kirkjusóknunum og leggur fast, hvat tær fáa í part av kirkjuskattinum (limagjaldinum hjá kirkjufólki). Próstadømisráðið ummælir eisini mál, sum hava stóran týdning fyri kirkjukassarnar, og sum Stiftsstjórnin[1] tekur avgerð um, ella mælir landsstýrismanninum til at gera av.

Próstadømið er – við verandi skipan – embætis- og heimildarøkið hjá dómprósti og hjá próstadømisráðnum. Allar kirkjusóknirnar eru í einum próstadømi; men lóggávan letur upp fyri, at tær kunnu verða skipaðar í fleiri próstadømi.

Dómpróstur er næsti maður biskups í tign og er kirkjubókaførandi sóknarprestur við heimakirkju biskups, dómkirkjuna. Hann hevur tí nakrar serstakar embætisskyldur umframt; men um vit síggja burtur frá hesum serstøku uppgávum dómprósts, fara próstarnir og próstadømisráðini at hava og røkja nett somu skyldur, í hvør í sínum próstadømi, um fleiri próstadømi verða.

Eftir § 5, stk. 1 í galdandi lóg kann landsstýrismaðurin eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar skipa Stiftið í fleiri próstadømi, og í serstøku viðmerkingunum til § 5 varð mett, at bæði uppgávur og fólkakirkjuskipanin gera, at tørvur er á at hava fleiri enn eitt próstadømi. Viðmerkjast skal, at landið alt er í einum stifti; men meðan Føroya stift og Føroya land eru sama landafrøðiliga øki, er innihaldsligur munur: Ein partur av fólkinum er ikki limur i fólkakirkjuni. Tí er valla rætt at nýta hugtakið "landið", tá rætt verður um lóggávu um innankirkjulig viðurskifti.

[1] Í Stiftsstjórnini er biskupur føddur formaður, landsstýrismaðurin tilnevnir eitt roynt embætisfólk, og kirkjuráðslimir velja eitt kirkjufólk.
Stiftsstjórnin umsitur miðsavnaða partin av fíggjarkervi kirkjunnar, Kirkjugrunnin og Tiltaksgrunnin. Hon varðar eitt nú av lønum og rakstrarútreiðslum til prestarnar, starvsfólkini á stiftsumsitingini og av prestagørðunum. Stiftsstjórnin hevur eisini umsjón við próstadømisráðnum og kirkjuráðunum.

Fyrimunir eru tó eisini við at hava eittans próstadømi, og tí er higartil ikki býtt upp. Verða fleiri próstadømi, verður eitt nú neyðugt, at Stiftsstjórnin hevur ein størri leiklut, heildarligari samskipan og raðfesting viðvíkjandi.

Galdandi lóggáva byggir á ta fyritreyt, at embætisskyldurnar millum próstar ikki verða býttar upp á annan hátt, enn at stiftið verður býtt upp í fleiri próstadømi. Í hinum fólkakirkjunum í gamla danskt-norska kongaríkinum er heldur ikki siðvenja at býta embætisskyldurnar millum próstar upp innihaldsliga.

Uppskot biskups er at royna eina skipan, har dómpróstur heldur fram í próstadømisráðnum og við virkseminum í mun til kirkjusóknirnar annars. Ein annar próstur skal sýna kirkjubøkur og hava umsjón við fyrisitingarliga virkseminum hjá kirkjubókaførandi sóknarprestunum yvirhøvur, umframt at hann skal røkja stórar partar av verkligu starvsfólkaleiðsluni í mun til sóknarprestarnar, sum siðvenja er, at próstur í stóran mun røkir biskupsins vegna.

Uttan mun til stóra verkliga týdningin, sum próstaembætið hevur, er lutfalsliga ódýrt at skipa ella leggja niður próstaembæti. Einans dómpróstaembætið er serstakt. Próstaembætið annars er eitt hjástarv, sum ein og hvør sóknarprestur í embæti, ið lýkur førleikakrøvini at gerast biskupur, kann fáa at røkja afturat embætinum sum sóknarprestur. Hettar er reglusett í §§ 18 og 19 í lógini um embæti og størv í fólkakirkjuni, løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 2013, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 30. apríl 2018.

Av tí at innihaldsligt uppbýti millum próstaembæti hvørki hevur verið siðvenja í Føroyum, Danmark, Noregi ella Íslandi, verður mett ivasamt, um heimild skuldi verið fyri at framt slíka nýskapan í kirkjuskipanini, hóast talan er um eitt serstakliga lítið inntriv.

Kirkjupolitiskt er tað í hvussu so er skeivt at fremja inntriv í kirkjuskipanina embætisliga, uttan so at greið heimild er fyri tí – eisini í hesum føri, hóast ongin serstakur kirkjuligur symbolikkur er við uppbýtinum í próstadømi ella talinum av próstaembætum, ið fyrst og fremst eru verkligar fyriskipanir: Føst siðvenja er, at tillagingar og broytingar í kirkjuni verða framdar við lóg, uttan so at greið heimild er fyri teimum í lóg ella í fastari ikki-løgfestari siðvenju.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at útvega greiða heimild til, at landsstýrismaðurin eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar kann gera av, at tveir próstar skulu vera í próstadøminum, og eftir tilmæli biskups býta upp embætisuppgávurnar innihaldsliga teirra millum og gera av, hvør teirra skal vera limur í próstadømisráðnum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Nýskipanin, sum uppskotið hevur við sær, er, at til fer at bera at velja at býta upp embætisskyldurnar innihaldsliga millum próstar í sama próstadømi.
Broytingin verður, at tveir próstar fara at kunna virka í sama próstadømi, hvør á sínum innihaldsliga øki.
Fyrimunurin, sum uppskotið ber við sær, er serliga, at til fer at bera at stovna eitt próstaembæti afturat, soleiðis at fleiri herðar vera at bera próstaupgávurnar, uttan at hetta (sum eftir nú galdandi lóggávu) nýtist at føra við sær, at Stiftið verður býtt upp í fleiri próstadømi. Soleiðis

fer eisini at bera til at velja at lata vera við at gera nakað økisligа grundað fíggjarligt uppbýti í kirkjuni og harvið eisini at lata vera við at stovna nýtt próstadømisráð. Harvið slepst eisini undan teimum fíggjarligu og verkligu kostnaðum, ið høvdu fylgt við einum slíkum uppbýti.

Tá broytingin er komin í gildi, fer Stiftsstjórnin við heimild í §§ 5 og 5 a. at kunna velja millum at gera landsstýrismanninum tilmæli um at lata Stiftið vera annaðhvørt

- eitt próstadømi við einum prósti
- tvey ella fleiri próstadømi, hvørt við sínum prósti
- eitt próstadømi við tveimum próstum, hvør við sínum parti av embætisuppgávunum.

Seinast nevndi valkosturin er nýskipanin við uppskotinum.

Talan er sostatt heldur um eina tillaging enn eina broyting, tí tær skipanir, sum higartil hevur borið til at hava, fara framvegis at vera møguligar, men ein einfaldari valkostur kemur afturat.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð 8. mars sent Felagnum fyri Kirkjuráðslimir, Prestafelagnum og biskupi til ummælis við freist til 13. mars.

Føroya Stiftsstjórn hevur 9. mars 2023 latið skrivligt ummæli, har hon metir, at lógaruppskotið samsvarar við uppskot Stiftsstjórnarinnar, og at tað bøtir um møguleikarnar fyri at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá dómprósti. Ongin neilig viðmerking er í ummælinum.

Felagið fyri Kirkjuráðslimir hevur á grækarismessu latið skrivligt ummæli, har tað boðar frá, at tað tekur undir við endamálinum við lógaruppskotinum.
Felagið ynskir tó eisini, at uppgávubýtið próstanna millum verður lagt fast, og harafturat at allir kirkjuráðslimir skulu vera við til at velja dómpróst, ið eisini skal fáa álagt fasta skyldu at vitja kring landið. Hettar hevði borið eina bygnaðarbroyting við sær, og at eisini lógin um embæti og størv í fólkakirkjuni varð broytt. Áneyðir kunnu vera fyri at taka spurningin um setanartilgongdina, dómprósti viðvíkjandi, til viðgerðar; men í verandi skipan velja allir kirkjuráðslimir 4 kirkjufólk í Próstadømisráðið og eitt í Stiftsstjórnina. Biskupur er einasta hirðaliga embæti, ið allir kirkjuráðslimir virka við til at manna, so talan er um eina rættiliga prinsipiella broyting, sum bæði kann bera nýggj vandamál og nýggjar møguleikar fyri loysnum við sær. Ein slík broyting eigur tí at verða tikin til viðgerðar á ein slíkan hátt, at góð tíð verður til at viðgera málið við allar partar í kirkjuni, áðrenn lógaruppskot hesum viðvíkjandi verður orðað.

Prestafelagið hevur 13. mars latið skrivligt ummæli, har tað boðar frá, at tað vegna stutta freist ikki hevur havt møguleika at viðgjørt málið gjølla, men at tað ongar viðmerkingar hevur.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.
Sóknarprestur, sum tekur á seg próstembæti at røkja afturat, skiftir lønarflokk, men meirútreiðslan av hesum verður ikki so fræg, at hon í sjálvari sær verður orsøk til at økja landskassastuðulin til fólkakirkjuna.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, men ber kortini við sær ein fyrisitingarligan lætta.
Kirkjan er ikki partur av fyrisitingini hjá landi ella kommunum, men røkir fyrisitingarligar uppgávur fyri landsmyndugleikarnar: Kirkjubókin er grundskráin í landinum, og kirkjubókaførandi sóknarprestur er jaðarferðarmyndugleiki og navnamyndugleiki á fyrsta stigi. Harumframt er kirkjubókaførandi sóknarprestur eftirkanningarmyndugleiki í málum um hjúnavígslu, og allir sóknarprestar hava vígslumyndugleika viðvíkjandi teimum gott 80 prosentunum av fólkinum, sum eru limir í fólkakirkjuni.
Próstur er innankirkjuligur eftirlitsmyndugleiki, øllum hesum myndugleikauppgávum viðvíkjandi. Kemur eitt próstaembæti afturat, verður størri orka til at avgreiða ivamál og aðrar forðingar, ið javnan taka seg upp.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur hvørki jaligar ella neiligar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Líkindi eru tó fyri, at mál um at gera ábøtur á kirkjur, at byggja tær ella at byggja tær um, fara at verða málsviðgjørd nakað skjótari. Hettar skuldi verið ein lítil lætti hjá ráðgevum og byggifyritøkum, sum taka uppá seg arbeiði viðvíkjandi kirkjum, tí verandi málsgongdir eru tungar og drúgvar.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir annars.

Fyri virksemið í fólkakirkjuni yvirhøvur leggur lógaruppskotið tó lunnar undir ávísar batar, tí málsviðgerðin, bæði millum kirkjuráð, Próstadømisráð og Stiftsstjórn og millum sóknarprestar, próst og biskup, kann ganga skjótari.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er ikki viðkomandi fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið er ikki viðkomandi fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Uppskotið broytir ongi viðurskifti, fevnd av Evropeiska mannarættindasáttmálanum.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið broytir ikki beinleiðis viðurskifti, ið eru fevnd av Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Kendar markaforðingar eru ikki á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger ongi inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Ásetingar um skatt ella avgjøld eru ikki í lógaruppskotinum.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld, ella um at heimila at gjald verður ásett.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur ikki landsstýrismanninum heimild at áseta reglur, men gevur landsstýrismanninum treytaða heimild at gera av, at tveir próstar skulu vera í sama próstadømi, og at býta heimildirnar teirra millum, herundir gera av, hvør av próstunum skal vera limur í pórstadømisráðnum.
Heimild landsstýrismansins at gera av, at tveir próstar skulu vera í sama próstadømi er treytað av tilmæli Stiftsstjórnarinnar, meðan heimildin at luta uppgávurnar próstanna millum er treytað av tilmæli biskups.

Heimildarásetingarnar eru myndaðar eftir § 5 í lógini, ið heimilar landsstýrismanninum at gera av, eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar, at skipa prestagjøldini í próstadømi.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við uppskotnu ásetingini fer Stiftsstjórnin at kunna gera av at mæla landsstýrismanninum til at velja at lata tvey próstaembæti vera í sama próstadømi. Biskupur kann tá mæla landsstýrismaninum til at býta embætisuppgávurnar próstanna millum innihaldsliga, soleiðis at próstarnir fáa hvør sínar sergreinar.

Í § 5 er ásett, at landsstýrismaðurin skipar prestagjøldini í próstadømi eftir tilmæli frá Stiftsstjórnini.
Við ásetingini í uppskoti ber til – í staðin fyri at býta upp í fleiri próstadømi, og at lata próstarnar røkja nett somu uppgávur, hvør í sínum landafrøðiliga øki – at býta embætisuppgávurnar innihaldsliga millum próstarnar.

Eftir § 5 kann landsstýrismaðurin ikki sjálvur gera av at skipa prestagjøldini í próstadømi. Hetta skal vera eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar. Tað er tí í besta samljóði við verandi skipan, at landsstýrismaðurin eisini fær tilmæli um at lata tveir próstar virka í sama próstadømi frá Stiftsstjórnini.

Orðingin "Hann lutar tá...." í seinna punktum er vald til tess at tongja avgerðina um at lata tveir próstar vera í sama próstadømi og avgerðina um at býta upp arbeiðsuppgávurnar innihaldsliga teirra millum óloysiliga saman. Verður valt at lata tvey próstaembæti vera í sama próstadømi, verður samstundis neyðugt at tryggja, at ivi ongantíð verður um málsræði og ábyrgdarbýti próstanna millum.

Talan er sostatt um eina samanhangandi avgerð í tveimum liðum. Fyrri liður í avgerðini er treytaður av tilmæli Stiftsstjórnarinnar, meðan seinni liður er treytaður av tilmæli biskups.

Próstar eru næstu menn biskups, og ásett er í § 19 i lógini um embæti og størv í fólkakirkjuni, at biskupur einsamallur ger landsstýrismanninum tilmæli um prást, meðan ásett er í § 21 í lógini um embæti og størv í fólkakirkjuni, at tilgongdin, tá dómpróstur verður settur, er átøk tilgongdini, tá sóknarprestur verður settur; men tó soleiðis, at tilmæli biskups einsamalt er avgerandi fyri innihaldið í tilmælinum til landsstýrismannin. Samsvarandi hesum verður mett rættast, at tað er biskupur, og ikki Stiftsstjórnin, ið ger landsstýrismanninum tilmæli um, hvussu uppgávurnar verða býttar próstanna millum.

Av tí at ásett er í § 5, stk. 3 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum, at próstur er í próstadømisráðnum, verður mett neyðugt at áseta staðiliga heimild til at gera av, hvør av próstunum er limur í próstadømisráðnum.

**Til § 2**
Vanlig áseting um gildiskomu.

Almanna- og mentamálaráðið, 21. mars 2023

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Føroya Stiftsstjórn
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Prestafelag Føroya